# Upplivingarbúskapur á breddan

**Komandi vinnuráðstevna í Norðurlandahúsinum um »Kreativitet, innovatión og upplivingarbúskap« verður sett hósdagin í komandi viku**

RÁÐSTEVNA
*Kim Simonsen*

Ein av teim stóru megatrends í heiminum í dag sær út til at vera upplivingarbúskapur, ið vit kenna frá eitt nú nógvu festivalunum kring landið. Vit eru í holt við at fáa eina mentan, ið alt meiri er ávirkað av hesi upplivingarmentan - bæði innan innihaldsframleiðslu, ferðavinnu, handil, móta, ítrott og onnur øki. Bert í Keypmannahavn umsetur hesin nýggi upplivingarbúskapurin fyri yvir 48 mia kr. árliga. Árligi vøksturin innan hendan ídnaðin er 31. prosent, mótvegis 3. prosentum innan alt annað vinnulív.

»Kreativitet, innovatión og upplivingarbúskap« er evnið hósdagin, 9. november 2006, tí tá verður ein serstakliga áhugaverd ráðstevna um hesi økini, ið øll hava sera nogv at siga. Tiltakið er í Norðurlandahúsinum við fyrilestrum frá kendum





*Elin Heinesen er í løtuni í farloyvi frá blaðstjórastarvinum á KIWI-magazin, og er tað hon, sum hevur samskipað ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum*

nøvnum, undirhaldi og pallborðsfundi.

Ráðstevnan, vendir sær tí til øll innan vinnulív, handilslív, politiskt lív og mentanarlív, sum vilja vita meira um, hvussu vit í Føroyum kunnu gera okkum galdandi í alheimshøpi – bæði vinnuliga og mentanarliga.

### Fyrireikarnir

Tað er cand. mag Elin Heinesen, ið stendur fyri hesi áhugaverdu fyrilestrunum. Elin hevur fyri tíðina eitt hálvt ára farloyvi frá starvi sínum sum blaðstjóri á danska blaðnum KIWI magazine. Elin hveur nógvar royndir við samskifti v.m. innan alnetis-, marknaðarførings-, fjølmiðla- og mentanarøki.

Hon hevur nú í samstarvi við Menningarstovuni tikið stig til at seta upplivingarbúskap ovast á breddan. Við hesi ráðstevnu er ætlanin at geva føroyingum íblástur til at hugsa stórt, og marknaðarføra og 'branda' okkum betri í útheiminum. Hon hevur gjørt hetta við íblástri frá, hvussu vit við kreativiteti, innovatión og tvørfakligum samstarvi kunnu tilleggja vørum okkara størri virði úti í heimi.

Málbólkurin eru vinnulívsfólk og fólk, sum arbeiða við handli, men eisini onnur, sum arbeiða kreativt – t.d. listarfólk – kunnu við fyrimuni luttaka í stevnuni.

### Okkurt til heilan og hjarta

Ráðstevnan hevur íblástur at bjóða, skriva fyrireikarnir. Hesin er ikki bara til heilan, men eisini til hjarta. Umframt fyrilestrar og pallborðsfund verður tí eisini ymiskt undirhald á skránni, so sum filmar, ljósmyndashow, tónleikur og framsýning hjá Gluggaglæmu við listahandverki.

Ein av bólkunum, ið vera við hendan dagin eru Deja Vu, ið gjørdust føroysku vinnararnir av altjóða tónleikakappingini GBOB, ið skulu spæla og framføra eitt fjøltáttað show.

Skemtarin og sjónvarpsverturin Jákup Veyhe kemur at vísa bestu filmarnar, sum filmverkstaðið »Klippfisk« hevur staðið fyri, umframt onkran spildurnýggjan tónleikavideofilm.

Og ein av fyrilestrahaldarunum málar ein málning, har kreativa prosessin kann ávirkast av áhoyrarunum.

### Nógv nøvn ávegis til Føroya

Við til hendan dagin eru eisini kend nøvn, fólk, sum hava drúgvar royndir – bæði praktiskar og teoretiskar. Øll eru garvaðir fyrilestrahaldarar, og hesi eru von við at halda fyrilestrar í altjóða høpi.

- Tað væntar áhoyrarunum nakrar mennandi upplivingar. Hetta eru fólk við sterkari persónsmensku, serstakliga áhugaverd, undirhaldandi og inspirerandi at lurta eftir, sigur Elin Heinesen.

### At keypa sum ein uppliving

Ein av fyrilestrunum verður eitt ping-pong millum tey bæði, donsku Kathrine Heiberg og svenska Lasse Brodén, sum saman hava altjóða fyritøkuna ReTeam.

Lasse Brodén er búskaparfrøðingur frá Lunds universitet og Brand Manager frá IHM (Institute of Higher Marketing) og Kathrine Heiberg er cand.merc. jur fra Copenhagen Business School við spesiali í kundaforstáilsi og kundaupplivingum. Fyrilestur teirra hevur heiti: »Hvorfor – og hvordan skal man brande sin virksomhed.« Fyritøka teirra ReTeam hevur høvuðssæti í størstu innkeypsmiðstøðini í Norðurlondum, Field's í Keypmannahavn.


Runavíkar kommuna søkir eftir

## Pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum

Á Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 2 barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari, 1 barnagarðsstova við 20 6-ára gomlum børnum og 1 stova við børnum við serligum tørvi.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**

- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

**Søkt verður eftir:**

➢1 pedagogi 35 t. um vikuna
➢1 pedagogi 30 t. um vikuna

Setan verður frá 1. des. 2006 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss leiðara ella Mariu í Króki varðaleiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 17. nov. 2006, kl. 12,00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará



# Rørsmiður

Til vaksandi virksemi okkara hava vit tørv á einum dugnaligum rørsmiði. Vit ímynda okkum, at tú ert røkin og fyrikomandi, og at tú saman við okkum er áhugaður í at menna fyritøkuna enn meira.

Ring til okkum á tlf. 315008 og tosa við Áka Mortensen, stjóra, og fá meira at vita um starvið. Lønin verður eftir avtalu.

**Sp/f Hiti**
Stoffalág 33
Postsmoga 3285
110 Tórshavn